

*Jóhanna Olsen, forkvinna í Lívfrøðingafelagnum, Gunvør Hoydal og Dánjal Petur Højgaard, sum vegna Lívfrøðingafelagið handaði Gunvør viðurkenningina*

# Viðurkenning til Gunvør Hoydal

Mikudagin 11. november fekk Gunvør Hoydal, lívfrøðingur, viðurkenning frá Lívfrøðingafelagnum, aftan á at hon hevði hildið ein fyrilestur á seinasta Darwin-tiltakinum í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð.

Í grundgevingunum verður m.a. sagt, at Gunvør hevur inspirerað og útstrálað enthusiasmu fyri lívfrøðini og innført nýggj evni innan lívfrøðina. Hon var t.d. tann fyrsta at undirvísa í mýliskari lívfrøði – DNA og tí, ið hartil hoyrir. Eisini grundlegði hon fakið Fiskivinna á HF-skeiðum, handilsskúlum og miðnámsskúlum. Hetta hevur verið við til at gjørt, at nógvir ungir føroyingar hava hildið fram í lívfrøðiligum ella handilsligum fiskivinnulesnaði í t.d. Noreg, sum hevur havt stóran týdning at byggja upp kunnleika innan hetta yrkið. Lívfrøðingafelagið var stovnað í 2007.

**-red**



*Leif Erik Niclasen*




# Jólakalendarin hjá Hjálpini

Jólakalendarin "Gleðilig jól 2009" er komin út. Tað er Hjálpin v. Leif Erik Niclasen á Argjum, sum gevur kalendarin út.

Ágóðin av søluni fer til jólapakkar við matvørum til familjur kring landið og úti í heimi, sum hava tørv á hjálp. Serliga er tað fyri føroysk húski, sum hava mist forsyrgjaran, eins og stuðul til einligar mammur og pápar.

Kalendarin er gjørdur soleiðis, at fyri hvønn dag eru nakrir vinningar at vinna. Tølini standa á baksíðuni á kalendaranum, ið verður seldur av fólki, sum koma at selja hann við dyrnar.

Kalendarin hevur øll árini kostað 50 krónur. Í samstarvi við TAKS hevur Hjálpin fingið loyvi at selja hann fyri 100 krónur, um fólk vilja tað, men um onkur ikki hevur ráð at keypa kalendaran fyri 100 krónur, ber til at keypa hann fyri 50 krónur. Fólk kunna eisini seta pening inn á konto nr. 4.221.100 í Føroya Banka.

Hjálpartænastan hevur virkað í 12 ár, og jólakalendarin hevur verið seldur síðan ár 2000. Leif Erik sigur, at eru tað vaksin fólk kring landið, sum vilja verða við at selja jólakalendarin, eru tey meira enn vælkomin at ringja til sín á tlf. 506558.

**-red**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Wivica Birch Larsen** andaðist á Ålborg Hospitali mikudagin 11. november, 47 ára gomul.

## Dagurin

**13. november. Arcadius**, deyður ár 437. Aðalborðin maður, sum var í fylginum hjá vandalakonginum Geiserik. Tá ið tað kom upp, at hann var kristin, varð hann tikin av døgum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum stuðlaðu, hjálptu til og sýndu samkenslu, tá kæri maður mín

**Emil Olsen**
**Glyvrar**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Sverra Steinhólm, prest, fyri góð orð í kapellinum og Meinhard Bjartalíð fyri uggan og troystarríka talu við jarðarferðina.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Eysturoyar Ellis- Røktarheim.
Serstøk tøkk til starvsfólkið á Røktarheiminum og Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu Emil til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Helga Olsen**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Vinna Eliasen**
**Klaksvík**

doyði og varð jarðað.

Takk til prest, organist, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Takk til Leif fyri vakran sang. Takk fyri kransar, blómur, heilsanir og fyri peningagávur til Klaksvíkar Sjúkrahús.
Takk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til í samband við jarðarferðina og ervið, og tykkum, sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Nanna, Petur, Alfred og Bryngerð**